Skráset. nr. 4627
7. roknskaparár

‘13

# Ársfrásøgn



# PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR



## Felagið

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110 Tórshavn
Tel +298 345600
betri@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 4627
7. roknskaparár

## Nevnd

Regin Hammer, nevndarformaður
Súni Schwartz Jacobsen, næstformaður
Heini Joensen
Herjolvur P. Jakobsen

## Stjórn

Mortan Poulsen, stjóri

## Grannskoðan

SPEKT
løggildir grannskoðarar Sp/f

Innanhýsis grannskoðanin í
TF Holding samtakinum

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir
nærri áseting.



# INNIHALDSYVIRLIT


Partafelagsupplýsingar 2

5 ára yvirlit 5

Leiðslufrágreiðing 6

Rakstrarroknskapur 16

Fíggjarstøða 17

Eginognsuppgerð 19

Notur 20

Leiðsluátekning 28

Váttan frá innanhýsis grannskoðan 30

Váttan frá óheftum grannskoðara 31






# 5 ÁRA YVIRLIT

| HØVUÐSTØL (KR. 1.000) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 264.313 | 76.963 | 124.007 | 110.459 | 41.954 |
| Tryggingarveitingar | -37.180 | -8.043 | -8.774 | -6.815 | -754 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 34.629 | 20.630 | 5.388 | 11.563 | 9.779 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -15.369 | -18.259 | -13.477 | -21.406 | -13.581 |
| Úrslit av endurtrygging | -562 | -333 | -328 | -219 | -180 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -4.161 | -4.710 | -9.277 | -16.397 | -12.601 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging | 802 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Úrslit eftir skatt | 115 | -2.479 | -7.082 | -13.091 | -7.182 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur | 646.524 | 371.332 | 304.542 | 183.292 | 68.344 |
| Eginogn | 39.266 | 39.151 | 31.630 | 38.711 | 31.802 |
| Ognir í alt | 691.342 | 415.644 | 339.885 | 228.226 | 108.624 |

## LYKLATØL

| | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 5,8% | 23,7% | 10,9% | 19,4% | 32,4% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 3,0% | 5,5% | 5,7% | 17,4% | 30,2% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 2.296 kr. | 4.806 kr. | 3.985 kr. | 11.401 kr. | 33.700 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -2,3% | -4,6% | -4,9% | -16,4% | -29,4% |
| Váðaúrslit | -1,5% | -2,3% | -1,2% | -2,9% | -3,7% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Ognarkapitalstig | 6,1% | 10,5% | 10,4% | 21,1% | 46,5% |
| Yvirfulnaðarstig | 33,4% | 335,0% | 32,9% | 198,7% | 1.008,9% |
| Solvensdekningur | 140,5% | 149,8% | 115,2% | 146,5% | 118,4% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 0,4% | -8,5% | -24,6% | -63,2% | -42,1% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 0,3% | -7,0% | -20,1% | -51,8% | -34,5% |



# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## ÁRIÐ 2013

Betri Pensjón P/F er eitt lívstryggingar- og pensjónsfelag, ið selir pensjónsloysnir til føroyska marknaðin. Felagið vendir sær bæði til einstaklingar og feløg, og hevur góðar og smidligar loysnir til øll.

Árið 2013 gjørdist seinasta árið, áðrenn eftirlønarlógin kom í gildi. Lógin, sum varð samtykt á tingi í mai 2013, ásetti, at allir føroyingar skuldu stovna sær eftirlønarkonto áðrenn 31. desember 2013. Hetta sást aftur í tilgongdini av nýggjum kundum við ársenda.

Betri Pensjón P/F gjørdi í 2013 fleiri nýggjar avtalur við fakfeløg og hevði tí stóra tilgongd av kundum. Kundatalið við árslok 2013 var 11.521. Hetta merkir, at nærum annarhvør lønmóttakari í Føroyum hevur avtalu við felagið. At náa so stórum kundatali, nú felagið hevur verið á marknaðinum í góð 6 ár, er sera nøktandi.

Samlaðu tryggingargjøldini í 2013, íroknað innskot og pensjón flutt frá øðrum feløgum, vóru 264,9 mió. kr ímóti 77,3 mió kr. í 2012. Stóri vøksturin stavar serliga frá pensjónum og innskotum, sum flutt eru frá øðrum pensjónsfeløgum í sambandi við yvirtøku av avtalum við fakfeløg.

Tey árligu leypandi tryggingargjøldini vóru 52,6 mió. kr. í 2013 ímóti 34,7 mió. kr. í 2012. Hetta er ein vøkstur uppá 52%, og verður hetta mett sera nøktandi.

Í fíggjarætlanini fyri 2013 varð roknað við einum lítlum yvirskoti. Rakstrarúrslitið hjá Betri Pensjón P/F í 2013 aftaná skatt varð 0,1 mió. kr. í yvirskoti ímóti 2,5 mió. kr í halli í 2012. Samlaði rakstrarkostnaðurin var 15,4 mió. kr., ímóti 18,3 mió kr. í 2012. Nýggja eftirlønarlógin hevði stórar KT-útreiðslur við sær í árinum.

Framgongd tykist aftur vera komin í heimsbúskapin, sum í 2013 hevði ein vøkstur uppá 3%. Búskapirnir í evruøkinum fóru frá búskaparligari afturgongd í byrjanini av árinum til hóvligan vøkstur. Bæði í USA, Evropa og Japan framdu tjóðbankarnir átøk fyri at tryggja áhaldandi lágar rentur og fyri at stuðla undir vakstrarspíran. Metlágar stýrirentur eyðkendi 2013, og ongi tekin eru um, at hesar fara at hækka í næstum. Prísvøksturin er framvegis sera lágur og politiski viljin til haldgóðan, búskaparligan vøkstur er stórur.

Flestu greinarar roknaðu tíðliga í 2013 ikki við, at tjóðbankarnir fóru at lækka stýrirenturnar enn meira, men kortini lækkaðu tær í evruøkinum og í Svøríki og Norra. Búskaparligu vísitølini hava sum heild bent á jaliga bógvin í 2013. Í USA er arbeiðsloysið fallið niður á 7%, og rímiliga stór framgongd er á bústaðarmarknaðinum. Samstundis tykist privata nýtslan at kvinka uppeftir. At brúkarin er meira hugaður um búskaparstøðuna og framtíðina hevur stóran týdning fyri búskapargongdina og búskapin. Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at amerikanski tjóðbankin í desember byrjaði at avmarka afturkeypið av lánsbrøvum í marknaðinum. USA tykist at endurvinna búskaparliga støðufestið eftir fíggjarkreppuna fyrr enn væntað, og evruøkið er eisini ávegis. Eisini hava jalig tekin verið at hóma í hart rakta Suðurevropa.

## EITT SERA GOTT PARTABRÆVAÁR

Tær tríggjar íløgudeildirnar, ið gera íløgur í partabrøv, stóðu seg rættuliga ymiskt í desember. Deildin, ið ger íløgur í donsk partabrøv, kastaði 2,43% av sær í desember. Árliga avkastið gjørdist sostatt 36,88%, sum er sera gott. Eisini tær báðar partabrævaíløgudeildirnar, ið støðla pening heimsfevnandi, góvu gott avkast í 2013 – ávikavist 13,12% og 26%. Yvirhøvur stóðu partabrøv seg sera væl í 2013. Í USA hækkaði S&P500 vísitalið 29,6%, og er hetta størsta árliga hækkingin síðan 1997. Eisini aðrir marknaðir eru hækkaðir nógv í 2013. Týska DAX vísitalið hækkaði 25,48% og japanska TOPIX vísitalið hækkaði 54,39%. Tó eru lond, har partabrøv stóðu seg minni væl. Í Brasilia fall Ibovesta vísitali 15,5%, og sama rákið sást í fleiri øðrum "emerging markets"-londum.




Tá talan er um lánsbrøv, hevur 2013 verið meira ivasamt. Rentustøðið var og er framvegis á einum metlágum støði. Hetta merkir, at skiftandi rentan á lánsbrøvum hevur verið lutfalsliga lág. Samstundis blivu lánsbrøv við longri gildistíðum rakt av kurstapi, tí marknaðarrenturnar á hesum lánsbrøvum eru hækkaðar nakað orsakað av batnandi búskaparligum útlitum. Avkastið á donskum lánsbrøvum var tí mest sum onki í 2013. Vit vænta somu avbjóðingar á lánsbrævaøkinum í 2014.

## KOMANDI ÁRIÐ

Sjálvt um skuldarkreppa setti dám á fleiri lond í evruøkinum, Kina hevði lægsta búskaparvøkstur í 13 ár og USA stríddist við stórar fíggjarpolitiskar avbjóðingar, so góvu lánsbrøv og partabrøv vinning í 2013. At lánsbrøv góvu vinning, komst millum annað av, at íleggjarar valdu tryggleika og góðtóku tí lágu rentuna. Á partabrævamarknaðinum øktu átøkini hjá miðbankum kring heimin um íløguhugin og tryggjaðu partabrøvum gott avkast.




## GOTT AVKAST Í 2013

Samlaða avkastið av partabrøvum í 2013 var 21,99%, meðan avkastið av lánsbrøvum var 0,91%.




Øll íløguprógvini, sum Betri Pensjón P/F nýtir, góvu vinning í 2013.

## FÍGGJARSTØÐAN

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F vaks úr 415,6 mió. kr. til 691,3 mió. kr. í 2013.

Avsetingarnar fyri Unit Link avtalur vuksu úr 367,8 mió. kr. til 614,8 mió. kr.

Eginognin var 39,3 mió. kr. við árslok 2013 ímóti 39,2 mió. kr. í 2012.

## BÝTIÐ AV ÁRSÚRSLITINUM

Nevndin mælir til, at ársúrslitið verður flutt til komandi ár.

## ÚTLIT FYRI 2014

Útlitini hjá Betri Pensjón P/F fyri 2014 eru góð. Tað verður støðugt arbeitt við at náa út til so nógvar kundar sum til ber. At eftirlønarlógin nú er sett í gildi, fer at hava jaliga ávirkan á kundatilgongdina í 2014.

Betri Pensjón P/F fer framhaldandi at bjóða seg fram sum pensjónsfelagið hjá einstaklingum, virkjum og fakfeløgum. Felagið væntar vøkstur í tali av kundum og tryggingargjøldum, og roknar við einum lítlum avlopi í 2014.

## FÍGGJARÚTLITINI FYRI 2014

Tað er trupult at meta um gongdina á lánsbrøvum og partabrøvum komandi árið. Okkara framtíðarmynd er, at avkastið frá lánsbrøvum aftur verður á einum lágum støði. Útlit eru til, at renturnar stigvíst fara at vaksa eitt vet, sum framstig verða at síggja í altjóða búskapunum og amerikanski meginbankin fer at føra ein lagaligan peningapolitikk. Tað fer at trýsta lánsbrævakursirnar. Hetta nýtist ikki at bera við sær neiligt avkast fyri árið, tí skiftandi rentan kann viga upp ímóti kurstapinum. Vit meta tí, at avkastið á lánsbrøvum verður á leið sama støði sum í 2013.

2013 bar brá av sera góðum avkasti frá partabrøvum. Við ársbyrjan vóru partabrøvini lutfalsliga lágt virðisásett, men er virðisásetingin nú mett rímilig. Vit meta tí, at avkastið frá partabrøvum í 2014 verður á einum lægri støði enn í 2013. Kortini eru góð útlit til at avkastið frá partabrøvum verður hægri enn avkastið frá lánsbrøvum.

## HENDINGAR EFTIR ÁRSLOK

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni við árslok 2013 til í dag er onki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## VITANARTILFEINGI

Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 9



hava høgt vitanarstøði. Øllum starvsfólkum verður tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

## MENNING
Betri Pensjón P/F leggur stóran dent á at betra um kappingarførið við øðrvísi tryggingarvørum, og tað verður støðugt arbeitt við menning á hesum øki.

## VIRKISGONGDIR
Fyri at tryggja, at allir viðkomandi kundaupplýsingar eru til taks og lætt atkomiligar, verður arbeitt miðvíst við at goyma hesar ravtøkniliga (elektroniskt). Arbeitt verður miðvíst við at hava eina dagførda og nútímans heimasíðu, so kundin skal rokna heimasíðuna sum besta miðilin at koma í samband við felagið. Á heimasíðuni skal kundin finna allar upplýsingar um síni pensjóns- og tryggingarviðurskifti.

## TØKNIFRØÐI
Stórur dentur verður lagdur á rakstrartrygdina í teimum tøkniligu loysnunum, sum valdar verða. Støðugt verður arbeitt við at styrkja um KT-trygdina, sum er grundað á KT-politikk, sum ásetur tey yvirskipaðu trygdarkrøvini.

Menning og rakstur av kjarnuskipanum eru løgd hjá uttanhýsis veitara. Hetta er gjørt fyri at tryggja framhaldandi menning og rakstrartrygd og eisini við atliti til tilfeingið og kostnað.

## COMPLIANCE OG ÁBYRGD
Fyri at tryggja, at allar leiðreglur, politikkir og reglugerðir verða hildnar, er complianceætlan gjørd. Hon skal tryggja, at greið ætlan fyriliggur viðvíkjandi endurskoðan og eftirmeting av øllum leiðreglum, politikkum og reglugerðum á hvørjum ári.

Stjórnin hevur ábyrgdina av, at reglugerð, leiðreglur og politikkir verða fylgd.

Ábyrgdarhavandi av compliance hevur árliga samrøður við viðkomandi starvsfólk fyri at staðfesta, hvørt leiðreglur og politikkir verða fylgd í verki.

Á hvørjum ári ger nevndin eftirmeting av hvørji einstakari reglugerð og leiðreglu, og av øllum politikkum. Staðfest verður um leiðreglur, politikkir ella reglugerðir skulu dagførast. Nevndin fær tilmæli um dagføringar og tekur avgerð.

Sostatt verður tryggjað, at allar reglugerðir, leiðreglur og politikkir hjá felagnum støðugt fylgja ásettum lógarkrøvum, og at eftirlit er við, at hesi verða fylgd í verki.

## STÝRING AV VÁÐA
Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Betri Pensjón P/F nýtir væl skipaðar mannagongdir til at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórnin og leiðslan annars alsamt halda eyga við verða hildnar.

**Marknaðarváði**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Rentuváði<br><br>Partabrævaváði<br><br>Mótpartsváði<br><br>Gjaldførisváði | Yvirskipaða málið við íløguvirksemi felagsins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin setur.<br><br>Miðað verður ímóti at hava eina rímuliga spjaðing av íløgunum. | Nevndin í Betri pensjón hevur samtykt ein íløgupolitikk, sum ásetir karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi ella í minsta lagi einaferð um árið.<br><br>Marknaðarváðin verður avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan.<br><br>Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í íløguprógv við undirliggjandi lánsbrøvum og partabrøvum.<br><br>Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í íløguprógvum, sum skrásett eru í keypsskálum.<br><br>Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.<br><br>Tað verður leypandi gjørd frágreiðing um íløgugongdina hjá felagnum. |

**Tryggingarváði**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Livitíð<br><br>Deyðstíttleiki<br><br>Avlamnistíttleika<br><br>Spjaðing | Lønandi virksemi á øllum tryggingarproduktum.<br><br>Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar.<br><br>Avmarkandi úrslitsávirkan frá einstøkum skaðahendingum við endurtrygging. | Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðarstøðuni.<br><br>Greiðar inntekningarreglur.<br><br>Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum.<br><br>Gott dátugrundarlag. |

**Rakstrarligur váði**

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| KT-váðar<br><br>Løgfrøðiligir váðar<br><br>Umsitingarligir váðar<br><br>Svik<br><br>Umdømi<br><br>Strategi | Tað verður ásannað og góðtikið, at ikki slepst heilt undan rakstrarligum váðum, men at hetta støðugt skal avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur | Felagið avmarkar rakstrarligan váða við politikkum, leiðreglum, innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført.<br><br>Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør.<br><br>Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan. |

Víst verður eisini til Váðafrágreiðingina hjá móðurfelagnum Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á., sum er at finna á heimasíðuni www.trygging.fo.

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 11

## ETISKAR REGLUR Í SAMBANDI VIÐ ÍLØGUR

Betri Pensjón P/F setir stór krøv til, hvussu samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir hvørjar fyritøkur eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.

## VÁÐAFRAMTÍÐARMYNDIR

Váðaviðurskiftini eru myndaði í talvuni niðanfyri. Talvan vísir váðaviðurskiftini undir teimum settu fyritreytunum fyri teir týdningarmestu váðafaktorarnar. Teir settu faktorarnir skulu ikki takast sum væntanirnar hjá Betri Pensjón P/F, men skulu einans takast sum dømi.

| Váðaviðurskifti við ymiskum framtíðarmyndum - tølini eru eftir skatt | Váðamynd | Samlað ávirkan á úrslit (t.kr.) | Broyting í eginogn felagsins |
|---|---|---|---|
| 31. desember 2012 | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -439 | -1,1 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 439 | 1,1 % |
| Partabrøv | c | -1.417 | -3,6 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |
| | | | |
| 31. desember 2013 | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -280 | -0,7 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 280 | 0,7 % |
| Partabrøv | c | -792 | -2,0 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |

**Váðamyndir:**

a) Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig
b) Rentulækking uppá 0,7 prosent stig
c) Partabrævalækking á 12 prosent
d) Fall í marknaðarvirðinum á bygningar á 8 prosent

## KAPITALSTYRKI

Niðanfyri er yvirlit, ið vísur kapitalstyrkina hjá Betri Pensjón P/F í mun til tryggingarskyldurnar:

| KR. 1.000 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Eginogn | 39.266 | 39.151 |
| Immateriel ogn | 2.576 | 3.205 |
| Útsett skattaáogn | 0 | 0 |
| Grundarfæfeingi | 36.691 | 35.946 |
| Fæfeingiskrav | 26.111 | 24.000 |
| Kapitalstyrki | 10.579 | 11.946 |

Við árslok 2013 var kapitalstyrkin hjá felganum 10,6 mió.kr. í mun til 11,9 mió.kr. við árslok 2012. Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv.

Viðmerkjast skal, at fæfeingiskravið hækkaði pr. 1. januar 2013 frá 3,2 mió. evrum (24.000 t.kr.) til 3,5 mió. evrur (26.111 t.kr.) grundað á lógarbroyting í Tryggingarlógini.

## INDIVIDUELLI SOLVENSTØRVUR

Føroysku ásetingarnar um individellan solvenstørv eru meinlíkar teimum í Danmark, og eru hesar galdandi inn til nýggja evropeiska Solvens II ætlandi verður sett í gildi. Individuelli solvenstørvurin ger upp kapitalkravið fyri tryggingarfelagið við støði í váðunum, felagið hevur. Vegleiðingin hjá Tryggingareftirlitinum ásetir ikki nakran serligan hátt til uppgerðina. Felagið skal sjálvt velja uppgerðarháttin og skal taka støðu til allar týðandi váðar.

Sum fastur táttur í váðastýringini, eyðmerkir og nøgdargreinar nevndin minst eina ferð um árið allar týdningarmiklar váðar hjá felagnum. Fyri hvønn váðabólk verður ásett eitt kapitalkrav, sum nýtt verður í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvinum. Váðametingin er í høvuðsheitinum grundað á politikkir, sum hvørt ár verða viðgjørdir og góðkendir av nevndini. Í uppgerðini av individuella solvenstørvinum tekur Betri Pensjón P/F støði í Solvens II royndarútrokningini QIS5 frá EU.

Individuelli solvenstørvurin hjá Betri Pensjón P/F er 16,8 mió.kr. við árslok 2013. Yvirdekningurin í mun til individuella solvenstørvin var 19,9 mió.kr.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

TF Holding P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F P/F og eigur allan partapeningin hjá felagnum.

## LEIÐSLUSTØRV HJÁ NEVND OG STJÓRN

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

**Nevndarformaður: Regin Hammer**
Stjóri í TF Holding P/F, umframt hetta er Regin eisini forstjóri í Tryggingarfelagið Føroyar P/F.

**Nevndarsessir:**
Nevndarformaður: Faroes Insurance Company Guernsey Ltd.
Næstformaður: TF Ognir P/F
Næstformaður: TF Íløgur P/F
Næstformaður: Búagrunninum undir Vinnumálaráðnum

**Næstformaður: Súni Schwartz Jacobsen**
Forstjóri í TF Holding P/F, umframt hetta er Súni eisini forstjóri í Eik Banka P/F.

**Nevndarsessir:**
Nevndarformaður: TF Íløgur P/F
Nevndarformaður: TF Ognir P/F
Nevndarformaður: Inni P/F
Nevndarformaður: Notio Framtaksfelag P/F
Nevndarformaður: Elektron P/F
Nevndarformaður: Virðisbrævamarknaður Føroya P/F
Nevndarformaður: Felagið Føroyskir Peningastovnar
Næstformaður: Fastogn P/F
Næstformaður: Faroe Insurance Company Guernsey
Nevndarlimur: Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar

**Nevndarlimur: Heini Joensen**

**Nevndarsessir:**
Nevndarlimur: H. N. Jacobsen's Bókahandil P/F

**Nevndarlimur: Herjolvur P. Jacobsen**

**Nevndarsessir:**
Nevndarformaður: Bókamiðsølan P/F



↘ Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

↘ Fíggjarstøða 31. desember

↘ Notur til ársfrásøgnina

## RAKSTRARROKNSKAPUR 1. JANUAR - 31. DESEMBER

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | **TRYGGINGARGJØLD FYRI EGNA ROKNING** | | |
| 2 | Bruttotryggingarinntøkur | 264.875 | 77.296 |
| | Endurtryggingargjøld | -562 | -333 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **264.313** | **76.963** |
| | **ÍLØGUVIRKSEMI** | | |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 10.850 | 9.269 |
| 4 | Virðisjavningar | 21.984 | 10.507 |
| | Rentuútreiðslur | 0 | -12 |
| | Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | 1.795 | 866 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **34.629** | **20.630** |
| | **TRYGGINGARVEITINGAR** | | |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -9.500 | -15.567 |
| 6 | Broyting í endurgjaldsavsetingum | -27.680 | 7.525 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-37.180** | **-8.043** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link avtalur** | **-247.054** | **-74.314** |
| | **RAKSTRARKOSTNAÐUR AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| 7 | Nýtekningarkostnaður | -9.048 | -8.780 |
| 7 | Fyristingarkostnaður | -6.322 | -9.479 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-15.369** | **-18.259** |
| | **Flutt úrslit av íløguvirksemi** | **-3.499** | **-1.687** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **-4.161** | **-4.710** |
| 8 | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi** | **802** | **0** |
| | **Íløguúrslit av eginognini** | **3.499** | **1.687** |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **140** | **-3.023** |
| 9 | **Skattur** | **-25** | **544** |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **115** | **-2.479** |



## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 10 | **Immateriell ogn** | **2.576** | **3.205** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 0 | 0 |
| 11 | **Materiell ogn í alt** | **0** | **0** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 42.663 | 31.453 |
| | Onnur útlán | 11.754 | 0 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 15.721 | 10.682 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløgur í alt** | **70.138** | **42.135** |
| 12 | **Íløguognir í alt** | **70.138** | **42.135** |
| 13 | **Íløguognir knýttar at Unit Link avtalum** | **614.820** | **367.766** |
| | Áogn hjá tilknýttum fyritøkum | 1 | 1.624 |
| | Onnur áogn | 3.126 | 0 |
| | **Áogn í alt** | **3.127** | **1.624** |
| | **Aðrar ognir** | | |
| | Aktuell skattaáogn | 0 | 462 |
| | **Aðrar ognir í alt** | **0** | **462** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur og leiga tilgóðar | 176 | 0 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 505 | 452 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **681** | **452** |
| | **OGN Í ALT** | **691.342** | **415.644** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | **SKULD** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 50.000 | 50.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 35.000 | 35.000 |
| | Flutt úrslit | -45.734 | -45.849 |
| 14 | **Eginogn í alt** | **39.266** | **39.151** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Endurgjaldsavsetingar | 22.364 | 75 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 9.339 | 3.491 |
| | Avsetingar til Unit Link avtalur | 614.820 | 367.766 |
| 15 | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **646.524** | **371.332** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 9 | Avsett til útsettan skatt | 462 | 575 |
| | **Avsettar skyldur í alt** | **462** | **575** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í sambandi við trygging | 868 | 147 |
| | Skuld til tilknýttar fyritøkur | 1.200 | 314 |
| | Onnur skuld | 1.936 | 3.443 |
| | **Skuld í alt** | **4.003** | **3.903** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **1.087** | **683** |
| | **SKULD Í ALT** | **691.342** | **415.644** |

1 Nýttur roknskaparháttur
16 Eventualskyldur og trygdarveitingar
17 Nærstandandi partar
18 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum
19 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað

## EGINOGNSUPPGERÐ

Kr. 1.000

| | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2012** | **47.500** | **27.500** | **-43.370** | **31.630** |
| **Rørslur á eginogn í 2012** | | | | |
| Kapitalhækking | 2.500 | 7.500 | | 10.000 |
| Ársúrslit | | | -2.479 | -2.479 |
| **Eginogn við árslok 2012** | **50.000** | **35.000** | **-45.849** | **39.151** |
| **Eginogn 1. januar 2013** | **50.000** | **35.000** | **-45.849** | **39.151** |
| **Rørslur á eginogn í 2013** | | | | |
| Ársúrslit | | | 115 | 115 |
| **Eginogn við árslok 2013** | **50.000** | **35.000** | **-45.734** | **39.266** |

## NOTUR

Kr. 1.000

## NOTA

1 **Nýttur roknskaparháttur**

### ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og Kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 2).

Klassifisering av skuld í sambandi við trygging og tíðargreining er broytt í mun til ársfrásøgn fyri 2012. Undangjald av váðagjøldum er flutt frá skuld til tíðargreiningar. Samanberingartøl eru tillagað broytingina.

Nýttur roknskaparháttur er annars óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2012.

**Avrunding av upphæddum**
Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tøl verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av tølunum.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støðdin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, somuleiðis virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Allar útreiðslur, sum eru við til at røkka ársins inntøku, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin. Eisini tryggingarveitingar og broytingar í avsetingum.

**Konsernviðurskifti og nærstandandi partar**
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**Roknskaparligar metingar**
Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**
Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á flytingardegnum.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**Rakstrarúrslit**
Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2013 eftir kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Tryggingargjøld f.e.r.**
Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

**Úrslit av íløguvirksemi**
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevnir um ársins rentuinntøku av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavning av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**
Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**
Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í samband við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**
Fevnir um tann partin av úrslitinum av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi**
Vísur tryggingartekniska úrslitið av felagsins sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum. Úrslitið er útgreinað í notu við niðanfyristandandi linjum:

- Tryggingargjøld fyri egna rokning
  Uppkravd tryggingargjøld við frádrátti av møguligum endurtryggingargjaldi.

- Skaðaendurgjøld
  Fevnir um goldnar veitingar í árinum við frádrátti av møguligum endurgjaldið frá endurtryggjarum og javningar av rørslum í skaðaavsetingum viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum.

  Skaðaendurgjøld fyri egna rokning fevnur soleiðis um kend og væntað skaðaendurgjøld í roknskaparárinum og eisini møguligt úrslit av endurgjaldsavsetingum.

  Skaðatiltak viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutrygging er í fíggjarstøðuni víst í linjuni endurgjaldsavsetingar, ið eisini inni heldur lívstryggingaravsetingar.

**Skattur**
Skattur av ársúrslitinum er roknaður skattur við 18% við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Kr. 1.000

## NOTA

1 **Nýttur roknskaparháttur,** *framhald*

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, TF Holding P/F. Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.

### FÍGGJARSTØÐAN

**Immateriell ogn**
Immateriell støðisogn verður upptikin til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

Avskrivingartíðarskeiðið fyri:
Ritbúnað 5-7 ár

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingartíðarskeiðið fyri:
Innbúgv 3-7 ár
Edv-útgerð 3-7 ár

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

**Íløguognir**
Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirðið. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði á børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**
Avsetingar til Unit Link avtalur fevnir um goldin inngjøld við ískoyti av virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.

Avsetingar til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum umfatar skyldur til at veita bonus og avsláttur av inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevnir um fráboðaðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar og eisini um móttikin eingangsinngjøld, ið enn ikki eru deild á Unit Link avtalur. Upphæddini fevnir harumframt um eina meting av tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

**Skuld**
Skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaogn, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Tíðaravmarkingar**
Fevnir um forútgoldin váðagjøld.

**Aktuellur skattur**
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Kr. 1.000

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 2 | **Bruttotryggingarinntøkur** | | |
| | **Leypandi gjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 4.688 | 3.462 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 47.944 | 31.269 |
| | **Leypandi gjøld í alt** | **52.632** | **34.731** |
| | **Eingangsgjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 1.505 | 2.739 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 193.313 | 23.448 |
| | **Eingangsgjøld í alt** | **194.818** | **26.186** |
| | **Inntøkur frá samlagstryggingum** | **17.425** | **16.379** |
| | | **264.875** | **77.296** |
| | **Herav gjøld** | | |
| | úr Føroyum | 264.875 | 77.296 |
| | úr EU-londum | 0 | 0 |
| | úr øðrum londum | 0 | 0 |
| | | **264.875** | **77.296** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 663 | 577 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 7.628 | 2.815 |
| | Samlagstryggingar | 9.210 | 7.838 |
| 3 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Rentur av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 624 | 65 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 10.226 | 9.204 |
| | | **10.850** | **9.269** |
| 4 | **Virðisjavningar** | | |
| | Partabrøv | 28.224 | 7.055 |
| | Lánsbrøv | -6.240 | 3.452 |
| | | **21.984** | **10.507** |
| 5 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Eftirløn | -2.516 | -88 |
| | Eingangsútgjøld við pensionering | -431 | -520 |
| | Avlamisveitingar | 0 | -113 |
| | Samlagstryggingar | -3.396 | -4.110 |
| | Afturkeyp | -3.157 | -1.621 |
| | Bonus og avsláttur | 0 | -9.116 |
| | | **-9.500** | **-15.567** |



Kr. 1.000

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 6 | **Broyting í endurgjaldsavsetingum** | | |
| | Avsett endurgjøld | -21.832 | 1.822 |
| | Avsett til bonus og avsláttur | -5.848 | 5.703 |
| | | **-27.680** | **7.525** |
| 7 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaðir innihalda** | | |
| | **Starvsfólkakostnað** | | |
| | Lønir | -4.246 | -4.261 |
| | Eftirlønir | -726 | -702 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -158 | -159 |
| | Lønarhæddaravgjald | -425 | -420 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -193 | -380 |
| | | **-5.749** | **-5.922** |
| | **Løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning * | -36 | -36 |
| | Stjórn ** | -1.172 | -1.140 |
| | Fulltíðarstørv | **8** | **8** |

* Av hesum hevur Herjolvur P. Jakobsen fingið samlaðar 36 tkr.
** Umframt upplýstu tøl, hevur stjórin eisini frían bil og fritt fjarsamskifti.

| | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f** | | |
| | Grannskoðan | -281 | -113 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -38 | -6 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **-319** | **-118** |
| 8 | **Úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging** | | |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 2.699 | 0 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **2.699** | **0** |
| | **Skaðaendurgjøld** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -1.440 | 0 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | -457 | 0 |
| | **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt** | **-1.897** | **0** |
| | **Úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging í alt** | **802** | **0** |
| 9 | **Skattur** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | 140 | -3.023 |
| | **Skattur 18%** | **-25** | **544** |
| | Skattur í samskatting | -138 | 1.666 |
| | Broyting í útsettum skatti | 113 | -1.122 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **-25** | **544** |
| | Verandi munir | 0 | 0 |
| | **Avstemmað skattaupphædd** | **-25** | **544** |

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 9 | **Skattur,** *framhald* | | |
| | **Útsettur skattur** | | |
| | Immateriell ogn | -464 | -577 |
| | Rakstrargøgn | 1 | 2 |
| | Framflutt hall | 0 | 0 |
| | **Útsettur skattur í alt** | **-462** | **-575** |
| 10 | **Immateriell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 9.122 | 20.375 |
| | Frágongd í árinum | 0 | -11.654 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 401 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **9.122** | **9.122** |
| | Avskrivingar 1. januar | -5.917 | -16.942 |
| | Afturførdar avskrivingar | 0 | 11.654 |
| | Avskrivingar í árinum | -630 | -630 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-6.547** | **-5.917** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **2.576** | **3.205** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **3.205** | **3.433** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **5-7 ár** | **5-7 ár** |
| 11 | **Materiell ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 1.756 | 1.756 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | 1.756 | 1.756 |
| | Avskrivingar 1. januar | -1.756 | -1.756 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-1.756** | **-1.756** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **0** | **0** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **0** | **0** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **3-7 ár** | **3-7 ár** |

**12 Útgreinan av íløguognum**

| | **Roknskaparligt virði** | |
|---|---|---|
| | **Ársbyrjan** | **Árslok** |
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 11.812 | 15.840 |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | **11.812** | **15.840** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 0 | 10.019 |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 16.939 | 13.722 |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | 2.701 | 3.082 |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **19.641** | **26.823** |

| | **Avkast í % áðrenn skatt** |
|---|---|
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 21,7% |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | **21,7%** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 0,9% |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 0,0% |
| Íløguprógv í virkislánsbrøvum | 2,7% |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **0,5%** |

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 13 | **Íløguognir knýttar at Unit Link avtalum** | | |
| | **Býti av íløguognum uttan trygd** | | |
| | Partabrøv | 177.336 | 123.732 |
| | Lánsbrøv | 437.484 | 244.034 |
| | **Íløguognir knýttar at Unit Link avtalum í alt** | **614.820** | **367.766** |
| 14 | **Eginogn** | | |
| | **Partapeningur** | | |
| | Partapeningur við ársbyrjan | 50.000 | 47.500 |
| | Hækking í árinum | 0 | 2.500 |
| | | **50.000** | **50.000** |
| | **Yvirkursgrunnur** | | |
| | Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 35.000 | 27.500 |
| | Hækking í árinum | 0 | 7.500 |
| | | **35.000** | **35.000** |
| | **Flutt úrslit** | | |
| | Fluttur úrslit við ársbyrjan | -45.849 | -43.370 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | 115 | -2.479 |
| | | **-45.734** | **-45.849** |
| | **Eginogn við árslok** | **39.266** | **39.151** |

**Partapeningur**

Samlaði partapeningurin hjá felagnum, er eitt partabræv
á 50.000 tkr., ið TF Holding P/F eigur.

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| Eginpeningur | 39.266 | 39.151 |
| Immateriell ogn | -2.576 | -3.205 |
| **Grundarfæfeingið** | **36.691** | **35.946** |
| **Fæfeingiskrav** | **26.111** | **24.000** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 15 | **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| | Avseting við ársbyrjan | 371.332 | 304.542 |
| | Bruttotryggingarinntøkur | 264.875 | 77.296 |
| | Tryggingarveitingar | -9.500 | -15.567 |
| | Rentur v.m. | 31.129 | 18.914 |
| | Umsitingargjald | -3.893 | -6.020 |
| | Váðaúrslit | -7.420 | -7.833 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar við árslok** | **646.524** | **371.332** |
| 16 | **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | | |
| | Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | 673.204 | 409.900 |

Felagið hevur gjørt leigusáttmála við systirfelag í samtakinum, og gongur hesin sáttmáli yvir tíðarskeiði 1. januar 2012 - 31. desember 2021.

Felagið er samskattað við onnur feløg í samtakinum. Samskattaðu feløgini bera tí samábyrgd fyri samlaðu skattaskyldunum.

**17 Nærstandandi partar**

**Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F**

| Navn og Heimstaður | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á.<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag hjá TF Holding P/F, ger samtaksroknskap. |
| TF Holding P/F<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**

Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. eigur 100% av partabrøvunum í TF Holding P/F.

TF Holding P/F eigur 100% av partabrøvunum í Betri Pensjón P/F og hevur tí avgerandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt feløg, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýttu feløgunum, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Í farna árinum, fyriuttan vanliga leiðslusamsýning, eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ellar aðrar nærstandandi partar enn tað, ið nevnt er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 7.



Kr. 1.000

**NOTA** 2013 2012

**17 Handlar við nærstandandi partar - framhald**

Felagið keypir tænastur frá móðurfelagnum og systirfeløgum í samtakinum.

Umsitingargjøld til og frá atknýttum feløgum í samtakinum verða avroknað eftir útreiðslunøktandi støði. Húsaleiga hjá atknýttum feløgum verður avroknað eftir marknaðartreytum.

Avtala er gjørd millum feløgini í samtakinum um renting av leypandi millumverandi og er hendan renta ásett eftir marknaðartreytum. Í árinum eru renturnar av leypandi millumrokning við atknýtt feløg samlað -3 tkr. (-12 tkr. í 2012).

Innistandandi hjá systirfeløgum í samtakinum verða rentað eftir vanligum marknaðartreytum.

| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg** | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Húsaleiga | -462 | -242 |
| Tænastu og umsitingargjald til atknýtt feløg | -3.725 | -6.696 |
| Afturbering | -2.362 | 0 |
| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg í alt** | **-6.549** | **-6.937** |

**18 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| **Hending** | **Minsta ávirkan á grundarfæfeingið í tkr.** |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | **-280** |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | **280** |
| Partabrævalækking á 12 prosent | **-792** |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | - |
| Tap uppá mótpartar | - |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.

**19 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað**

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Suður Amerika | Japan | Miðeystur | Onnur lond | Ei sundurgreinað | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 1,6% | 5,5% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 7,6% |
| Atfeingi | 0,0% | 4,4% | 0,4% | 0,0% | 0,3% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 5,7% |
| Ídnaður | 0,0% | 10,4% | 1,1% | 0,0% | 2,9% | 0,0% | 2,0% | 0,0% | 16,4% |
| Nýtsluvørur | 0,0% | 3,7% | 5,2% | 0,0% | 4,2% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 13,7% |
| Brúkaravørur | 0,0% | 6,7% | 5,0% | 0,0% | 0,5% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 12,1% |
| Heilsuviðgerð | 0,0% | 2,2% | 3,5% | 0,0% | 1,8% | 0,0% | 0,3% | 0,0% | 7,7% |
| Fígging | 0,0% | 7,7% | 5,2% | 0,0% | 3,2% | 0,0% | 1,3% | 0,0% | 17,3% |
| KT | 0,0% | 2,3% | 4,8% | 0,0% | 2,1% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 9,2% |
| Fjarsamskifti | 0,0% | 1,8% | 1,9% | 0,0% | 1,6% | 0,0% | 0,3% | 0,0% | 5,6% |
| Veiting | 0,0% | 0,2% | 2,6% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,7% | 0,0% | 3,6% |
| Ei sundurgreinað | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 1,0% | 1,0% |
| **Í alt** | **0,0%** | **41,0%** | **35,2%** | **0,0%** | **17,1%** | **0,0%** | **5,8%** | **1,0%** | **100,0%** |

# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 2013 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2013, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2013 - 31. desember 2013.

**BETRI PENSJÓN P/F**
Tórshavn, hin 24. mars 2014

**STJÓRN**

Mortan Poulsen, stjóri

**NEVND**

Regin Hammer, formaður

Súni Schwartz Jacobsen, næstformaður

Heini Joensen

Herjolvur P. Jakobsen

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend av ársaðalfundi felagsins

Tórshavn, hin / 2014

fundarstjóri



# VÁTTAN FRÁ INNANHÝSIS GRANNSKOÐAN

## ÁTEKNING Á ÁRSROKNSKAPIN

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

## FRAMDA GRANNSKOÐANIN

Grannskoðanin er gjørd við støði í kunngerð frá Tryggingareftirlitinum um fremjan av grannskoðan av tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og í tráð við altjóða standardum um grannskoðan. Hetta krevur, at grannskoðanin verður løgd til rættis og framd á slíkan hátt so grundað vissa fæst fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin er framd í tráð við tað arbeiðsbýtið, sum er avtalað við uttanhýsis grannskoðanina, og hevur fevnt um meting av skipaðum mannagongdum og innanhýsis eftirlitum, heruppií ta váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, og sum er rættað móti frágreiðingartilgongdum og týðandi handilsligum váðum.

Grundað á týdning og váða hava vit við stakroyndum eftirkannað upphæddir og aðrar upplýsingar í ársroknskapinum. Grannskoðanin hevur eisini framt eina meting av, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan hevur valt, er hóskandi, um roknskaparligar metingar hjá leiðsluni eru rímuligar og um hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Vit hava luttikið í grannskoðanini av týðandi og váðakendum økjum, og okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag fyri okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Okkara fatan er, at skipaðar mannagongdir og innanhýsis eftirlit, íroknað tann váðastýring, sum leiðslan hevur lagt til rættis, ið er rættað móti frágreiðingartilgongdini og týðandi handilsligum váðum, virka á tryggan hátt.

Herumframt er tað okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, skuld, eginogn og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2013 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 2013 í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Vit hava, sum ásett í lógini um tryggingarvirksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyristandandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 24. mars 2014

Petur A. Johannesen
*grannskoðanarleiðari*



# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## TIL KAPITALEIGARAN Í BETRI PENSJÓN P/F

## ÁTEKNING Á ÁRSROKNSKAPIN

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Betri Pensjón fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2013, síðu 15-29, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir lógini um tryggingarvirksemi.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.
Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.
Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2013 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2013 samsvarandi lógini um tryggingarvirksemi.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Vit hava, sum ásett í lógini um tryggingarvirksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyristandandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 24. mars 2014

**SPEKT**
**løggildir grannskoðarar SP/F**

Finnbjørn Zachariasen
*statsaut. revisor*

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

Betri pensjón

Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Tel 345600
www.betri.fo